## Út- & Sjónvarp

**STEREOANLEGG**
Pioneer stereoanlegg við JBL 300W hátalarum til sølu um hóskandi boð fæst
*508849*

**GAMALT SJÓNVARP**
sum virkar, kann fáast.
Sjónvarpsborð nýtt 300 kr.
*Tlf. 273592*

## Ymiskt

**REYÐI KROSSUR FØROYA**
Reyði Krossur Føroya tekur ímoti lutum til endurnýtslu.Handilin er opin hvønn dag frá kl 13:30-17:30 leygardag frá kl 10:30 - 14:00
*www.redcross.fo*

**FLYTIGÓÐS**
Flytigóðs úr Føroyum.
*Tlf. 224910*

**FØROYA HEIMAVIRKISFELAG**
Jólasølan 2008 verður 29. og 30. november 2008. Tilmelding fer fram hjá Katrin Joensen tlf. 457413 innan 20. oktober, sí eisini www.craft.fo
*Nevndin*

**BASARUR**
verður í fimleikarhøllini í Glyvraskúla 8 nov. 2008.
*Fimleikafelagið Støkk*

**TIMBUR/BRENNI**
Timbur/brenni selist.
*Tlf. 225054 ella 421527*

**HEIMAVIRKISSØLA**
verður í VB-húsinum 8. og 9. nov. Tekning seinast 31. okt. á
*Tlf. 373169, 374030 og 373054*

**SVIMJIKAPPINGARDRAKTIR TIL SØLU**
2 Tyr draktir og 2 Speedo draktir, allar til gentur, til sølu. Ring og hoyr nærri.
*Tlf. 443132 ella 593132*

**SANGIR TIL MERKISDAGAR**
Ynskir tú at gleða ein vin við einum sangi júst til hansara dag? - Átaki mær at skriva sangir til konfirmatiónir, rundar føðingardagar, brúdleypsdagar o.a.
*Ring 226623*

**TIL SØLU**
Um hóskandi boð fæst, verður handilin Heimdesign seldur.
*Tlf. 253557*

**MARKNAÐARDAGUR**
Marknaðardagur verður í ítróttarhøllini í Runavík 22.11.2008, tilmelding á tlf. 449088 ella 223590
*NSÍ*

**STUÐULSKONSERT Í KLAKSVÍK**
Stuðulskonsert verður í Badmintonhøllini 18. okt. kl. 19. Konsertin er til frama fyri tey fátæku har Calarasi missiónin arbeiðir í Romenien. Tað er ókeypis atgongd, innsavnan verður undir konsertini, nógvar ymiskar sangkreftir. Vit vóna nógv vilja verða saman við okkum hetta kvøld.

# HEILSANIR



**Góða fitta Durita**
Hjartaliga tillukku við degnum, vónandi ført tú ein mega feitan dag við nógvum góðum gávum. Vit elska teg.
**Ynskja mamma, Jørgen og Rókur**



**Góða Elsa**
Hjartaliga tillukku við tínum 1 ára føðingardegi 12. okt. Alt tað besta ynskja vit tær. Vit elska teg
**Jan, mamma og babba**


Sosialurin
*Heilsanir*
kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á míðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur:____________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn:
Bústaður:
Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<


**Brúdleyp**
Leygardagin 18. oktober kl. 15.00 giftast í Vágs kirkju Leila Lisberg úr Vági og Elian Hansen úr Saltangará. Veitslan verður fyri innbodnum í VB-húsinum kl. 19.00.

Leygardagin 8. november 2008. kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Súsanna Johannesen av Argjum og Bjarne Clausen úr Havn. Brúdleypið verður fyri innboðin á Hotel Føroyar kl. 19.00.

**50 + 50 ár**
Leygardagin 15. november 2008 halda Rúna Franksdóttir og Jakob Holm, Argir 50 + 50 ára føðingardag í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00. Tað hevði glett okkum at sæð familju, vinir og kenningar til henda dag. Tey, ið vilja gleða okkum at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 319858 ella 210198 ella á telduposti: jrholm@post.olivant.fo innan 9. november 2008

**50 ár**
23. oktobur verður Elinborg Hansen, búsitandi í Havn ættað úr Norðragøtu, 50 ár. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík fríggjadagin 31. okt kl. 19. Tekning til veitsluna á tlf. 44 10 68 ella 31 54 24 i seinasta lagi 20. okt. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**60 ár**
Týsdagin 28. oktober verður Elisabeth Matras-Olsen, Trongisvágur 60 ár. Dagurin verður hildin á Seglloftinum leygardagin 25. oktober kl. 19. Tey, ið vilja gleða meg við at koma, verða biðin um at siga frá innan 15. okt. á tlf. 371528 ella 263060.

**80 ár**
Leygardagin 8. nov. kl. 18 heldur Leif Múller, Porkeri 80 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í Sumba. Tey, ið vilja gleða meg við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 370538 ella 590538 innan 27. okt.

**85 ára føðingardagur**
22. okt. verður Brynhild Jensen, Sumba 85 ár. Føðingardagurin verður hildin í Samkomuhúsinum í Sumba leygardagin 18. okt. frá kl. 13.00 til 18.00. Opið hús har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 5. november kunnu hjúnini Signa og Jóhan Joensen, Kollafirði halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Ítróttarhøllini í Kollafirði leygardagin 8. november kl. 1830. Tey, ið vilja halda dagin saman við okkum, verða biðin at siga frá á tlf. 721628, 213448 ella teldupost: johsig@post.olivant.fo, áðrenn 31. oktober.

**Gullbrúdleyp**
Týsdagin 25. november hava hjúnini Henny og Martin Juul Jarnskor, Norðragøta, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 29. nov. kl. 18.00. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, vera vinarliga biðin um at siga frá innan 15. nov. á tlf. 442192, 441795 (Anita) ella 441995 (Unn).



**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 15. oktober kunnu Edva og Elibert Jacobsen, Fuglafirði halda silvurbrúðleyp. Opið hús við køldum borði verður í bygdarhúsinum í Leirvík frá kl. 18.00. Øll eru hjartaliga væl komin.

Leygardagin 15. novembur kl 13.00 giftast í Skála kirkju Paula S. Lervig av Skála og Óli Kristian á Torkilsheyggi av Nesi. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl 18.00. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 7. november á tlf. nr. 739093, 502050.





**30 + 30 ár**
1. og 17. november vera Tóra Láberg og Sonja Tungá 30 ár. Føðingardagurin verður hildin í Samljóð í Skopun 1. november 08 kl. 18.00. Tey, sum vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 25. oktober á tlf. 222223 Tóra og 580075 Sonja.